## Kjølar Kafé á Margarin-fabrikkini





Avlýsta kafékvøldið við Jens Marna Hansen og Mikkjal Hvannastein í Margarinfabrikkni fer nú endiliga av bakkastokki. Kvøldið skuldi uppruna-liga verða hóskvøldið 25. august, men nakrar dagar áðrenn hetta, hendi stórur vatnskaði á Margarin-fabrikkini. So tiltakið varð avlýst. Nú hós-kvøldið verður tiltakið so í umvældu Margarin-fabrikkini.

Bæði Jens Marni og Mikkjal hava fyrr spælt gittar í Kjølum, og eru báðir framúr gittarleikar-ar. Í løtuni er Jens Marni virkin í nokk Føroya besta dansibólki Show-monnum, og Mikkjal spælir í nógvum ymisk-um samanhangum. M.a. var hann innstillaður til heiðurin sum besti gittar-leikari til AME virðisløn-irnar.

Á kafékvøldinum fara teir at borðreiða við góð-um og hugnaligum kafé tónleiki, og hvør veit um okkurt Kjølar hitt ikki snýkir seg inn í millum løgini.

## Portalurin nógv vitjaður

KUNNINGARTØKNI

Portalurin var nógv vitj-aður meðan arbeiðs-steðgur var, í viku 42 røkti portal.fo stóran part av bráðfengis tíðinda-flutninginum í Føroyum, Útvarpið sendi sera skert, og heimasíðan hjá útvarpinum var ikki virk-in. Somuleiðis lá Dagur og Vika still, og hetta sæst aftur í Gallup tølun-um yvir vitjanir á før-oyskum heimasíðum.

Heili 29.298 brúkarar hava vitjað portal.fo til-samans 216.194 ferðir í viku 42 og hava teir hugt at 746.384 síðum. Hetta er ein munandi hækking í mun til viku 40, ið er seinasta vika Gallup hev-ur skrásett áðrenn ar-beiðsteðgin. Tá vitjaðu 26.573 brúkarar portal.fo 210.812 ferðir og hugdu at 507.773 síðum.

*Kelda: vevmátingarlistin hjá Gallup*

## Heimarøktin skal doypast

**Heimarøktin og Serforsorgin skal hava nýtt navn. Tí er avgjørt at skriva út navnakapping**

NAVNAKAPPING
*Jákup Mørk*

Síðani 1999 hava heima-røktin og serstovna-deildin verið ein stovnur. Navnið á stovninum hev-ur hesi árini verið Heimarøktin og Serfor-sorgin, men nú vilja hesi hava, at meira hóskandi navn skal finnast.

Tí er navnakapping nú útskrivað, og er ætlanin, at navnið skal boða frá einum felags samleika fyri tær fimm høvuðs-deildirnar, sum stovnurin hevur. tær eru eldraøkið (herundir heimarøktin), serstovnadeildin, stuðuls-skipanin fyri vaksin, deildin fyri sinnisveik og heilsufrøðiskipanin.

Øll hava rætt at taka lut í kappingini, og verða tríggjar virðislønir lætn-ar. Hesar eru á ávíkavist 15.000, 10.000 og 5.000 kr. Freistin ata senda inn uppskot er 1. desember.

*– Vit eru nú farin undir eina endurnýggjan av flotanum, og vit halda, at hetta slagið av flogførum er rætta stigið at taka júst nú, sigur Magni Arge, stjóri í Atlantsflog*



# Fimta farið í flotanum

**Atlantsflog hevur nú fingið sítt fimta flog-far í flotan. Mána-dagin seinnapartin lætti nýggjasta flog-farið úr Basel í Sveits og setti kós móti Norwich í Onglandi, har tað skal málast í Atlantic litum. Flog-farið, sum kemur til Føroya mikudagin í næstu viku, kostar um 50 mió kr**

FLOGFERÐSLA
*Eirikur Lindenskov*
*eirikur@sosialurin.fo*

Flogfarið er av slagnum BAE RJ 100, sum er ein nýggjari og størri útgáva av BAE 146 flogførunum, sum felagið frammanundan eigur. Flogfarið tekur upp til 95 ferðafólk og er eisini útgjørt við meiri fram-komnari og digitalari út-gerð. Flogfarið er bygt í 1999 og var tað yngsta av sínum slag í flotanum hjá sveitsiska felagnum Swiss, hagani tað er keypt.

- Hóast tað var við sorg-blídni, at tey søgdu farvæl til hetta væl roynda flogfar í Sveits, so gleddust tey kort-ini um, at flogfarið kemur til heiður og æru sum nýtt flaggskip í flotanum hjá Atlantic Airways, sigur Magni Arge, stjóri í At-lantsflog.

Flogfarið er eitt nummar størri enn tey gomlu. Tað er eitt sindur longri og eitt sindur breiðari. Tað hevur trý setur øðrumegin og tvey hinumegin, men av tí at tað er longri, tekur tað kortini eini 10-12 fólk fleiri.

– Hóast tað er størri og tekur meira, so brennir tað kortini eitt sindur minni, enn tey gomlu, so vit halda, at hetta er ein skilagóð íløgu, sigur Magni Arge.

Hann vísir á, at BAE flogførinni eru farin upp í prísi seinastu tíðina, eitt nú tí at Lufthansa, Swiss, gamla Sabena og tvey undirfeløg hjá Lufthansara hava gjørt av at halda fram við hesum týpum av flogførum.

– Vit høvdu kortini gjørt hesa avtaluna framman-undan, tí fingu vit tað fyri ein lagalin prís, sigur Magni Arge.

Flogfarið kemur vænt-andi til Føroya mikudagin í næstu viku og fer síðani í rutuflúgving serliga á Dan-markarleiðunum. Keyps-prísurin fyri flogfarið ligg-ur um 50 milliónir krónur.

– Vit eru nú farin undir eina endurnýggjan av flot-anum, og vit halda, at hetta slagið av flogførum er rætta stigið at taka júst nú, sigur hann.

Ætlanin við Airbusflog-førum liggur longri frammi. Magni Arge sigur, at tað var ein teknisk frams-sýning hjá Airbusverk-smiðjuni, tá Airbusflog-farið vitjaði herfyri.

– Men alt hevur verið eftirmett komandi tíðina, so taka vit støðu til, hvat vit gera í framtíðini.

Atlantsflog eigur nú fýra flogfør og leigar eitt flogar. Felagið hevur brúk fyri fimm flogførum í summar. Tó er greitt, at felagið ikki keypir tað flogfarið, sum í løtuni verður leigað.

– Fara vit at keypa enn eitt flogafar, so verður tað helst eitt sama slag, sum hetta nýggja, sigur Magni Arge.

# Lurta eftir 200 á netinum

Heimasíðan hjá Føroya best dámda punkbólki 200 er undir støðugari menning, og nú ber eisini til at hoyra tónleikin hjá bólkinum á alnetinum. 200 hava lagt løg av báðum fløgunum hjá bólkinum, á heimasíðuna, har tú heilt ókeypis, kann syngja við til m.a. Muscle-manblað, Sig ikki nei Kaj og Skitni Kartni.

Eisini eru myndasøvn, tíðindi og møguleiki fyri at downloada nógv ymisk teldutapet við 200 og papp-masjefokkjúfingrinum. Elskar ella hatar tú 200, er somuleiðis ein gestabók, har tú kanst fortelja teimum um kenslurnar.

Alt í alt ein heimasíða, ið gerst alsamt snøggari, vitja hana á www.tveyhundrad.net

**nud**




*Tað ber millum annað til at taka niður teldutapet við 200 á heimasíðuni*